gult cyan magenta svart



Minnir kanska nógv um føroysku vegirnar í 20'unum: Einki asfalt, bert grús, og ofta eru vegirnir avkvettir av áarlopi ella øðrum, og tá verður bara koyrt eftir nakna oyðimarkarlendinum.

Sum vit koyra í ein landssynning úr Ulaambaatar móti Uvurkhangai landslutinum – ein av landslutunum, ið harðast eru raktir av náttúruvanlukkuni – fáa vit enn fleiri prógv um náttúrunnar megi, sum vit ikki hava so stóra ávirkan á.

Í túsundatali liggja deyðu dýrini fram við vegnum, vit koyra. Orðatakið »hvør av øðrum liva má…« rennur mær til hugs. Vit síggja nýliga deyð dýr í heilum líki. Vit síggja eisini dýr, har ánarin hevur flett skinnið av dýrinum fyri at vinna nøkur oyru burtur úr skinninum. Sjónin er ikki tespilig, tá skinnini eru flett uttan av djórunum, og nú er lagað manni hjá róvfugli, úlvi og revi at gera sær dælt. At enda liggja berar beinagrindir og sløðast.

## Drúgv og trupul náttúruvanlukka

Fram við vegnum sita stoppmettar ørnir, sum næstan ikki orka á flog, sum tær hava etið av deyðu dýrunum – hóast vit fara úr bilinum fyri at strekkja beinini. Sum vit standa fáa vit eyga á næsta fasuna í vanlukkuni: Vegna nógva turkin í fjør, tá grasið vaks rættuliga illa, fingu rotturnar fótin fyri seg – tí tær eta grasrøturnar. Hetta árið er tí eitt rættuliga rottuár.

– 300.000 húsdjór líða neyð um vikuna. Helmingurin av landsins einari millión nomadum eru raktir av vanlukkuni, og tað er sera trupult hjá okkum at fáa hjálp, sigur Osorhun Batmunkh, sum er guvernørur í Uvurkhangai landslutinum. Hann væntar, at í minsta lagi fimm milliónir dýr fara at doyggja av svongd og kulda, áðrenn grasið grønkar í mai.

– Vit uppliva ikki tornadoir ella líknandi. Hendan vanlukkan er nógv truplari enn so, og hon mennist so spakuliga, at tað er so trupult at fáa vinna ljóð fyri henni í heimspressuni. Men okkum tørvar hjálp frá heimssamfelagnum, viðgongur Osorhun Batmunkh.

Hendan dzud-vanlukkan er tann fyrsta í 10 ár. Vanlukkan byrjaði í fjør, tá turkur var í vestaru landslutunum – og summarið var tað turrasta í 60 ár. Avleiðingin var, at húsdjórini ikki fingu tað neyðuga feittlagið fyri at klára seg gjøgnum veturin.

Síðani kom kaldasti vetur í 30 ár, við einum miðaltemperaturi tíggju stig undir tí vanliga, og kavin hevur eisini verið nógv meiri enn vanligt. Í februar doyðu fyrstu djórini – og nomadarnir fór at reka djórini eystureftir.

## Sera ringir vegir

Um hetta mundið, tá vitjað varð í Mongolia í apríl, elvdi kavabræðingin til, at einki samband var við partar av landinum. Við einum náttartemperaturi upp á minus 10 stig ganga fleiri vikur, áðrenn náttúran vaknar úr vetrardvala, hóast sólin hitar væl um dagin. Várið er truplasta árstíðin – við ógvusligum sandstormum sum gera tað trupult at vera uttandura.

Vegurin frá høvuðsstaðnum Ulaambaatar og vestureftir er ein av frægastu høvuðsvegum í landinum. Men hann er sera vánaligur. Teir fyrstu kilometrarnir eru asfalteraðir, men tað ger ikki tann stóra munin, tí vegirnir eru so óslættir kortini, at tað tykist hugaligari hjá okkum ferðandi, tá koyrt verður eftir møkini, har vegirnir eru skolaðir burtur. Tað tykist eyðsæð, at lítið er bøtt um vegirnar síðani kommunistiska skipanin fall í 1990.

Men landslagið er stórsligið, villar víðar víddir so langt eygað røkkur.

Eftir at hava koyrt í ein heilan dag koma vit fram til býin Arvaykheer, sum er høvuðsstaður í landslutinum Uvurkhangai. Tá helt eg ikki, at nógv kundi verið eftir av stoytdoyvarunum í bilinum, vit koyrdu við, ein fýrahjólstrektur Mitsubishi Shougon-líknandi bilur við onkrum asiatiskum navni.

## Privatisering og konkurs

Býurin var ikki júst nøkur fragd fyri eyga. Nógvur vindur var og kalt – minus 10 stig, og tá sandstormarnir herjaðu var best at vera innandura, tí ringt var at halda eygu opin.

Men sjónin lýsir helst væl støðuna í Mongolia: Stórar verksmiðjuhøllir stóðu sum spøkilsishús eftir kommunismunnar fall, privatiseringarnar og konkursirnar – soleiðis sum støðan er í nógvum av londunum eystanfyri, sum øll vóru partur í kommunistiska planbúskapinum.

Við privatiseringini vóru djórini býtt sundur millum nomadufólkið, og síðani hava nógv fólk roynt at vent aftur til nomadutilveruna. Tey hava fingið nøkur djór sum byrjunarkapital, og úrslitið er, at talið av nomadum er trífaldað seinastu 10 árini.

Fram til í ár hevur vælferðin hjá nomadunum bert gingið framá, stórar motorsúkklur eru vanlig sjón á steppunum. Men dzud'in hevur givið fólkinum ein lærupening: Tað hevði verið skilabetri at gjørt eina tryggingarskipan samstundis sum privatiserað varð.

## Staturin hjálpti

Undir gomlu skipanini var tað bert staturin, sum hevði trupulleikar av dzud'inum. Tað merkti bara, at djórini skuldu umfordeilast. Men fall kommunismunnar merkti eisini, at djóralæknatænastan fall burtur, og at statsliga hoyggjframleiðslan við goymslum í øllum landspørtunum at standa ímóti við, tá turkur var, eisini helt uppat.

Meðan vit eru í Arvaykheer sleppa vit at koyra við einum heryvirmanni út á steppurnar. Í einum einsamallum telti hitta vit 60 ára gomlu Maruush, sum hevur flutt seks ferðir við fimm vaksnum børnum við familjum hendan veturin. Hon er rørd og tárar av vitjanini og sigur okkum, at hon ikki hevur sæð fólk í ein mánað.

Familjan hevur minst helmingin av djórunum, seyður, geitir og neyt. 24 av teimum 30 heystunum eru rýmdir. Næstan øll lombini eru deyð av mjólkamangli. Tey lombini, ið eftir eru, eru inni í teltinum og fáa mjólk úr pattufløskum. Maruush torir ikki hugsa um, hvussu nógv av djórum hennara fara at doyggja. Er hjálp á veg? fregnast hon.

Heryvirmaðurin skrivar dúvliga niður, men má skuffa hana: Tað er so lítið, ið fæst, at tað langt frá nøktar allan tørvin. Og staturin hevur ikki ráð. Maruush nikkar við virðing.

Nomadufamiljur í tíggjutúsundatali hava seinastu árini stríðst fyri at arbeiða seg úr fátæktini, ið sambært almennu tølini er 50 dýr. Neyðin og vónloysi hevur ført við sær, at fólk aftur flýggja til býirnar.

Komin aftur til Ulaam Baatar fara vit tríggir norðurlendingar ein túr í býin. Uttan fyri tjóðartingsbygningin renna vit okkum av tilvild inn í lastbilafylgi. Vit fregnast og finna út av, at tað er japanski sendiharrin, sum letur landbúnaðarmálaráðharranum nøkur less av hoyggi. Lokalu miðlarnir flokkast rundanum, tá teir russisku meira enn hálvvánaligu lastbilarnir, sum best kunnu sammetast við teir, sum koyrdu í Havnini í sekstiárunum, standa í røð framman fyri tjóðartingsbygninginum. Men sambært ST-umboðsmanninum, sum vit hitta sama seinnapart, so er bara hoyggj til einaferð upp í munnin á øllum landsins kríatúrum



*Eins og í øllum hinum londunum eystanfyri eru flestu standmyndirnar av Lenin og Stalin burturbeindar, men býarmyndugleikarnir í Ulaambataar vildu kortini varðveita hesa standmyndina sum eitt søguligt minni, segði fryntliga guide okkara, Tunga*



*Eitt lastbilafylgi uttan fyri tjóðartingsbygningin í Ulaambaatar við hoyggi frá japanska sendiharranum*



# Vit eru ov stolt til hjálp

**– Mentaliteturin hjá okkum sigur, at vit vilja ikki tykjast fátæk í gestsins eyga. Vit kunnu viðganga, at vit hava truplar tíðir, men vit góðtaka ikki, at vit líða neyð, sigur 38 ára gamli forsætisráðharrin úr Tjóðskaparflokkinum , R. Amarjagal.**

NÁTTÚRUVANLUKKA

*Eirikur Lindenskov*

– Náttúrunnar dómstólur hevur talað - og vit hava tapt. Teir nýggju nomadarnir satsaðu upp á kvantitet heldur enn kvalitet. Men dzud'in er ein rættvísur dómari, sum vit hava kent í fleiri túsund ár.

Soleiðis sigur Myatavyn Tsagaan, sum er leiðari fyri felagsskapinum hjá mongolsku nomadunum. Hann er útbúgving djóralækni og journalistur og starvast dagliga í mongolska útvarpinum. Hann er farin um tey fimmti, og tað sæst í eygnabrá hansara, at hann tosar av royndum. Sjálvur er hann nomadi – uppvaksin á steppuni, men er seinni fluttur inn í býin – men hann er framvegis nomadi, leggur hann dent á.

– Altjóða hjálp er ikki rætti heilivágurin fyri Mongolia. Tey, ið hava mist alt, fáa nøkur nýggj djór at byrja umaftur við aftur fyri at arbeiða fyri aðrar nomadar soleðis sum vit altíð hava gjørt.

Myatavyn Tsagaan vísir frá sær, at dzud er økologiskt treytað

– Nomadarnir vita fullvæl, hvussu kensluborin náttúran er og um vandan um, at oyðimørkin veksur. Men hóast tað, so er landið so stórt, at tað sum einki kann bera nógvar ferðir so nógv djór, sum vit hava í dag, sigur hann.

– Í miðal hava vit dzud fimtahvørt ár. Skulu evropear nú til at hjálpa okkum fimta hvørt ár? Nei, við hesum lærupenga skulu vit endurbyggja nomadutilveruna út frá søguligum royndum, siigur hann.

Hann vísir á, at kommunistarnir royndu at broyta lívsformin hjá nomadunum í nøkur tíggjuáraskeið við teirra djóralæknatænastu, heilivági og vísundaligu royndum upp á at krossa djór úr Mongolia og Russlandi fyri at vinna meira mjólk og meira ull. Tankagongdin var vónleys, náttúran sjálv er tann einasti heilivágur fyri djjórini hjá nomadunum. Tey skulu tola at verða bakað í 40 hitastigum um summarið, men samstundis tola minus 40 kuldastig um veturin. Stovnurin reinsar seg sjálvan, sigur Myatavyn Tsagaan.

– Tey skulu tola eitt hálvt ár uttan mat og sjálv bera mótstandmegini móti sjúkum. Stovnurin reinsar seg sjálvan, og eftir hendan dzud'in fer talið á djóorum aftur at vaksa. Tey harðføru djórini klára seg – og tað merkir kvalitet, leggur Myatavyn Tsagaan dent á.,

Og hann sær fyri sær framtíðin hjá nomadunum:

– Kjøtið sum nomadarnir framleiða fer at verða eitt sera stórt tilfeingi í framtíðini. Livihátturin hjá nomadunum er tann mest modernaði, eg kann ímynda mær í einum heimi, har stórur dentur verður lagdur á berikraft og økologi. Hóast vit hava lært nógv undir kommunismuni, so kann tað bara ganga frameftir nú, sigur Myatavyn Tsagaan.

Og sum landsins forsætisráðharri segði við Sosialin, tá vit hittu hann á forsetaborgini dagin eftir:

– Mentaliteturin hjá okkum sigur, at vit vilja ikki tykjast fátæk í gestsins eyga. Vit kunnu viðganga, at vit hava truplar tíðir, men vit fara neyvan at góðtaka, at vit líða neyð. Fyri at siga tað á nomadamáli: Tú telur ikki tenninar á hestinum, tú føert sum gávu. Tað er ómøguligt at fáa altjóða lán uttan at brúka orðið »fátækradømi« – men tað er trupult fyri okkum at viðganga, at vit eru fátøk, sigur 38 ára gamli forsætisráðharrin úr Tjóðskaparflokkinum, R. Amarjagal.

Sambært forsætisráðharranum verður tapið av náttúrvanlukkuni upp á í minta lagi eina milliard US dollarar. Men eins og Myatavyn Tsagaan sær eisini hann fyri sær eina ljósa framtíð fyri Mongolia.

– Landið er so einastandandi og so ríkt upp á tilfeingi. Mongolia er eitt av teimum mest fantastisku menningarlondunum, ikki minst vegna høga útbúgvingarstøðið. Júst sum Djengis Kahn vann heimin við einum lítlum heri á hestbaki fyri 800 árum síðani, kunnu vit vinna heimin við kunningartøkni. Komið tit bara aftur um trý ár, tá skulu vit vísa tykkum, at vit hava internet allastaðni, helt R. Amarjagal uppá.

Jú, internetið hevur eisini vunnið fram í Mongolia – og hóast tað ikki var júst tað besta sambandið, so fekk undirritaði bæði lisið InternetSosialin og kannað teldupostin norðan fyri Gobi oyðimørkina – nærmast úti í óbygdum.

Men líkamikið, hvat forsætisráðharrin sigur, so er neyðin stór í Mongolia. Í Ulaam Baatar eru fleiri túsund gøtubørn, sum annaðhvørt eru foreldraleys ella børn, sum eru rýmd frá framman undan skroypuligum familjum.

Alkoholtrupulleikarnir eru stórir millum menninar, og tí verður meira satsað upp á genturnar, sum eru nógv størsti parturin av teimum lesandi á universitetunum. Tað eru eisini fyri tað mesta kvinnur, sum taka mikrolán, sum er ein av ST-verkætlanunum: Fólk læna upp til 100 dollarar, sum tey skulu gjalda aftur eftir einum ári, so tey fáa skapt sín egna handil ella virki til framleiðslu.

A internetkaféum síggjast eisini ungdómar – sum kanska staðfesta pástandin hjá forsætisráðharranum.



*– Náttúrunnar dómstólur hevur talað - og vit hava tapt. Teir nýggju nomadarnir satsaðu upp á kvantitet heldur enn kvalitet. Men dzud'in er ein rættvísur dómari, sum vit hava kent í fleiri túsund ár, sigur Myatavyn Tsagaan, leiðari fyri felagsskapinum hjá mongolsku nomadunum*



*– Mentaliteturin hjá okkum sigur, at vit vilja ikki tykjast fátæk í gestsins eyga. Vit kunnu viðganga, at vit hava truplar tíðir, men vit fara neyvan at góðtaka, at vit líða neyð, sigur 38 ára gamli forsætisráðharrin í Mongolia, R. Amarjagal*

Faktaboks:

## Eitt sindur um Mongolia

Areal: 1,57 milliónir km2
Mark við Russland og Kina. Syðri triðjingurin av landinum er Gobi-oyðimørkin. Norðanfyri og vestanfyri er meira gróður og skógarklødd fjallaøki og vøtn. Restin av landinum er fyri tað mesta steppur. Landið liggur í miðal 1.500 metrar frá sjónum og hevur eitt ekstremt innlandsklima við longum, køldum vetrum og stuttum sumrum.

Fólkatal: 2,4 milliónir. Helmingurin í býunum, hin helmingurin í bygdum og sum nomadar kring landið. Mongoliga er eitt av heimsins mest tuntfólkaða londum.

Djór áðrenn dzud (harða veturin) 33 milliónir móti 25 milliónum fyri 10 árum síðani.

Deyð undir dzud: Minst fimm milliónir djór. Sambært ST er neyðugt við altjóða hjálp at útvega teimum fátæku nýggj djór.

Høvuðstilfeingi: Græs - sum veitir landinum kjøt, mjólkaúrdráttir, ull, skinn og brenni av turkaðum ekskrementum.

Tilfeingi annars: Kol og nógv metall og mineral, sum ikki kunnu troytast vegna vantandi arbeiðsmegi og vantandi samferðslunet.

Søga: Herurin hjá Djengis Khan hertók helmingin av kenda heiminum frá pørtum av Evropa til Kyrrahavið í 1200-talinum. Farið varð undir at gera Kinesiska Múrin fyri meira enn 2000 árum síðani til tess at verja seg móti mongolum. Gjøgnum miðøld undir kinverkari ávirkan til kollveltingina í 1921. Síðani undir sovjettiskari ávirkan til kommunistiska stýrið uttan bardaga gav seg yvir fyri ymsu mótmælunum í 1990. Síðani demokrati eftir vesturlendskum mynstri.

Stjórn (apríl 2000): Tjóðskaparflokkurin og Javnaðarflokkurin, sum eru í listasamgongu. Teir skipaðu stjórn í 1996 og var tað hin fyrsta ikki-kommunistiska stjórnin. Teir høvdu 50 av 76 tjóðartingslimum. Kommunistaflokkurin er í andstøðu. Við valið 24. juni 2000 vunnu kommunistarnir 72 av teimum 76 tjóðartingslimunum. Tjóðskaparflokkurin fekk einans eitt umboð, menðan Javnaðarflokkurin einki umboð fekk. Síðani nýggja kommunistiska stjórnin tók við, eru el-prísirnir hækkaðir nógv, og tað hevur stóran týdning í Mongolia, tí tað avger orkuprísin - og orkan er sera týdningarmikil, tá tað frystir niður í 40 minusstig. Men úr Mongolia frætta vit, at nýggja stjórnini kortini roynir at halda sosiala støðið.

Djengis Kahn var máttmikil høvdingi. Seinast í 12. øld savnaði hann flakkandi ættbólkar í Suðursibiria. Ættbólkarnir vóru mongolar, og honum eydnaðist at skipa fólkið í stóran og máttmiklan her. mongolar vóru fólkaslag, sum livdi á skógarleysu víddunum í Landnyrðingsásia. Teir lvidu mest á rossabaki, og við teimum fekk Djengis Kahn gjørt tátíðar sterkasta her. Teir brúktu nýggjastu vápnini, t. d. krút og roykbumbur, so at eingin sá teir í álopi. Eingin vann á teimum. Í 1206 herjaði Djengis Hahn í Kina og síðani sum hvirluvindur um Ásia. Allar hernaðaratgerðir vóru lagdar væl til rættis, oog á rossabaki fóru teir ótrúliga skjótt víða. Altíð megnaðu teir at savana megina, tá ið mest stóð á, og teir brendu og herjaðu allastaðni. Teir loyptu ræðslu á fólk, hvagar teir komu. Í 1227 doyði Djengis Kahn, og so við og við syndraðist ríkið, tí at eftirmenninir klandraðust.

### Mongolska stórríkið

1206 Temudjin vinnur Mongolia
1218 Mongolar gera innrás í Persia (Iran)
1221 Mongolar gera innrás í Russland
1237 Abbasonur Djengis Kahn, Batu, ger innrás í Norðurrussland
1240 Batu ger innrás í Pólandi og Ungarn
1260 Stríðsmenn úr Egyptalandi, mamelukkar, vinna á mongulum
1279 Kublai Kahn vinnur á Kina
1370 Timur Lenk savnar tey trý vestaru kanatini